sjónvarp - sjónvarp - sjónvarp - sjónvarp - sjónvarp - sjónvarp - sjónvarp - sjónvarp - sjó

Fríggjakvøldið 20. juli kl. 22,50:

Billy Joel á Wembley



Hesaferð er tað ikki fótbóltur á Wembley, men tónleikur og songur við Billy Joel, kenda sangskrivaranum og tónlistamanninum.

Orsakað av tekniskum trupulleikum, verður bert fyrsti partur av konsertini á Wembley sendur í sjónvarpinum. Tað kemst av, at sendingin verður tikin niður í Danmark um sjónvarpsfylgisvein. Av tí at fylgisveinurin ikki vendir soleiðis í øðrum parti, at signal kann fáast í Danmark, verður annar partur av konsertini hjá Billy Joel tikin upp á video og sendur einaferð í august mánaða í ár.

Billy Joel var økendur klaverspælari á barrum á USA, tá hann brádliga gjørdist kendur fyri sangskriving sína.

Hann hevur nú framført í 12 ár, og er framvegis ógvuliga væl umtóktur.

Fríggjakvøldið 20. juli kl. 20,45:

Gestakaféin —



Hesaferð eru Jørgen Nørgaard og Leo Carpatu, gestir í sendirøðini, sum hevur heitið »Gestakaféin«

sjónvarp

Hósdagin 19. juli
20,00 **Ítróttur**

Fríggjadagin 20. juli
19,30 **Vitek**
20,20 **Uzbekiskar kvinnur**
20,45 **Gestacaféin**
21,15 **Ein sak fyri mannfólk** — fr. filmur
22,50 **Billy Joel**
23,50 **Liðugt**

Fríggjakvøldið 20. juli kl. 21,15:

Ein sak fyri mannfólk

Í Fraklandi verða árliga gjørdir umleið 100 filmir. Av hesum koma bert umleið 10 filmir til Danmarkar. Tó eru nógvir kendir filmsstjórar í Fraklandi, sum eisini hava funnið frama uttanlands. Ein teirra er Nicolas Ribowski, sum í 1981 gjørdi krimifilmin »Ein sak fyri mannfólk«.

Filmurin er í innihaldi bæði spennandi og snildur, um samanhaldið millum mannfólk, sum skal standa sína roynd, tá ein teirra er undir illgruna fyri at hava dripið konu sína.

Servolle, løgreglumaður, er limur í einum súkklufelag, sum hvønn sunnudag íðkar henda ítrótt uttanfyri Paris. Hin ríki Fauget, entreprennørur hevur helst sama áhuga fyri súkkluítróttinum, og Servolle stuðlar honum í at gerast limur í felagnum. Samstundis arbeiðir Servolle við at fáa greiði á, hvør er sekur í fleiri kvinnumorðum.

Ein sunnudag, tá limirnir eru á súkkluferð, verður kona Fauget myrd. Maðurin hevur sítt alibi í lagi, tí hann hevur verið á súkkluútferð við vinmonnunum. Hevur hann nú tað.

Servolle og Fauget leiklutirnir verða spældir av tveimum sera kendum sjónleikarum, Claude Brasseur og Jean-Louis Trintignant. Serliga Brasseur er kendur frá filminum hjá Goddard »Outsider-banden«. Trintignant er m. a. kendur frá filmunum »Medløberen« og »Min nat hos Maud«.

Serliga dygdargóða spælið millum hesar báðar sjónleikararnar ger »Ein sak fyri mannfólk« til ein film, sum er nakað meira enn vanligt.



Servolle, politistur (Claude Bresseur) jagstrar ein byrsumann, sum myrðir tilvildarligar kvinnur, sum hann sníkir seg fram á. Annar leiklutur verður spældur av Jean-Louis Trintignant

DANICA — køkurin
P/f HELLA
Tórfinsgøta 41
Tlf. 16477 Box 351
3800 Tórshavn

Tá Lee Iacocca kom til í leiðsluni fyri Chrystler, bilverksmiðjuna í USA, broyttist undirskotið til yvirskot.

Vit sóu hvussu persónurin virkaði í sáttmálasamráðingum, sum PR maður, familjumaður o.s.fr. Altíð við slíkum skundi, at tá hann skuldi takast upp til sjónvarpið, so gekk tað fyri seg í einum bili. — Jú ferð er yvir teimum hinumeðni havið.

Tá Iacocca greiddi frá barnadøgum sínum, var ikki nógv útlit til, at slíkur smádrongur sálarliga fekk møguleika at útinna nakað stórvegis. Tað var hann føddur til í familju, har pápin var í Ford fyritøku. Drongurin gekk í skúla og bleiv nummar 12 av 850 næmingum. Hann kendi tað sumhvørji hann gjørt okkurt skeivt, at hann ikki bleiv nummar eitt, tí tað væntaði pápin av soninum!

Løgið at hann kortini fekk ein tjans. Tað gjørdi hann tá hann kom í Chrystler, har hann fyrst koyrdi 20.000 skrivstovuólk og 40.000 arbeiðarar úr starvi, lánti átta milliardir krónur frá statinum, og fekk bilverksmiðjuna at bera seg — við yvirskoti. Hvørjar avleiðingar tað fekk fyri arbeiðararnar, fingu vit ikki nógv at vita um.

Enski krimifilmurin »Fyrsta sýningin«, var spennandi, men eisini áhugaverdur, tí hann so væl myndaði eitt umhvørvi. Hetta vóru sjónleikarar, sum undir venjing høvdu so nógvar trupulleikar at berjast við. Serstakliga væl vóru sjálvt teir minstu leiklutirnir myndaðir av framúrskarandi sjónleikarum. Bæði teir góðvarnu og teir, sum gjøgnum lívið høvdu fingið slíkan dám, at tú neyvan kundi kalla teir menniskju.

Hvat er óhugnaligari enn eitt tómt sjónleikarhús, sum annars bert kemur til sín rætt, tá stólarnir eru fullsettir. Ein ávísur trøllakendur dámur er yvir hesum. Júst hetta var viðvirkandi til, at filmurin so væl fylti út í rammurnar, tað sum ætlað var.

Dagny Joensen

sjónvarp - sjónvarp - sjónvarp - sjónvarp - sjónvarp - sjónvarp - sjónvarp - sjónvarp - sjó